*Eyðólv Dimon, skrivari javnaðarfloksins:*

# Nú skal sethúsa-skuldin sanerast

*- Landsstýrið skal hava ávirkan á, hvussu bankarnir verða stýrdir. Tað er ikki nóg mikið, at økja nevndina í Fíggingargrunninum við eygleiðarum. - Um vit so fáa 100 eygleiðarar afturat, so er tað líka mikið. Vit mugu hava eina bankaleiðslu, sum røkir áhugamál landskassans - gera føroysku umboðini í Fíggingargrunninum ikki tað, skulu tey skiftast út, sigur Eyðólv Dimon m.a. í samrøðu við Bergmál.*

Seinastu tíðina hevur nógv verið at hoyrt um sanering - serliga sanering av flakavirkjum. Sanering merkir í grundini at endurreisa, ella at umskipa eitt handilsfelag. Og tá vit nú tosa um sanering, hugsa øll uttan iva um, at strika og útseta skuld. Og tað er júst tað, sum verður gjørt í flakavinnuni í hesum døgum.

Niðurskrúvaði búskapurin í Føroyum - kreppan, hevur eisini við sær, at fólk ikki megna at gjalda síni sethúsalán. Hetta sigur seg sjálvt, tí skuldin lækkar ikki, tá lønirnar fara niður.

Nógv fólk hava saknað eina landsætlan um, hvussu sethúsamarknaðurin kann sanerast. Greitt er, at hetta má gerast - annars enda tað púra galið.

Bergmál hevur vent sær til Eyðólv Dimon, skrivara í Javnaðarflokkinum og fyrrverandi formann í SU, og spurt hann, hvat hann heldur um hesi viðurskifti.

Sum skrivari í javnaðarflokkinum er hann við til at taka nógvar avgerðir - og eisini avgerðir um, hvønn politikk flokkurin skal føra.

Vit spurdu hann fyrst, hvat hann heldur um avtaluna, sum gjørd var sætta oktober í fjør - fyri júst einum ári síðani:

- Orsøkin til at Sjóvinnubankin tá fekk hasar pengarnar, var at bankaeftirlitið hevði niðurskrivað viðrið á fýra kommunum og flakavirkjum til 0 krónur. Pantiviðrini svaraðu ikki til lánini, og tí noyddist landsstýrið at innskjóta pening fyri at bjarga bankanum, sigur Eyðólv.

- Bankin fekk 450 milliónur krónur, og tí kundu vit trúð, at lániskuldin hjá kommununum og flakavirkjunum minkaði tilsvarandi, sigur Eyðólv. - Men so var ikki! - Nú er so bankaeftirlitið komið eftir, at sethúsamarknaðurin als ikki hevur tað pantiviðrið, sum svarar til skuldina og nú ætla teir at nýta somu mannagongd - at niðurskriva viðrið. Á henda hátt verður landsstýrið aftur noytt at innskjóta kapital fyri ta skuld, sum bankaeftirlitið metir liggja omanfyri pantiviðrið á einstøku sethúsunum.

- Hetta var væntandi, heldur hann. - Men tað sum nú er umráðandi, er at bankarnir ikki enn einaferð fáa tilfluttan oyramerktan pening, um teir ikki lækka skuldina tilsvarandi hjá sethúsaeigarunum.

- Eingin veit, hvat bankarnir seinast brúktu peningin til, heldur Eyðólv, - men hann var ikki brúktur til fiskavirkini ella til kommunurnar. Tí mugu vit vóna, at landsstýrið hevur lært av mistakinum, og ikki aftur letur seg lumpa, soleiðis at teir gjalda fyri sethúsaskuld, sum bankarnir í staðin nýta til at bjarga øðrum mistum milliónum - fyri ikki at siga milliardum, tí stórur er tørvurin á kapitali, leggur hann afturat.

*Pengarnir, sum føroyski skattgjaldarin sprænir inn í bankarnar, eigur eisini at koma sethúsaeigarunum til góðar.*

*Tá tú nú tosar um bankarnar - er tað ikki landsstýrið, sum eigur bankarnar? Er tað so ikki landsstýrið sum sigur, hvar skápið sikal standa?*

- Nei, tíverri, sigur Eyðólv. Landsstýrið hevur onga ávirkan, hóast landið eigur fíggingargrunnin, sum eigur meirilutan av partapeninginum í bankanum. - Men hetta má broytast, og skil koma á, sigur Eyðólv. - Í mánaða var talið av nevndarlimum víðkað, soleiðis at landsstýrið fekk tveir eygleiðarar aftur at. Men hvat hjálpir tað? Um nevndin so verður víðkað við 100 eygleiðarum, so hjálpir tað einki. - Tað minsta vit kunnu krevja er, at nevndarlimirnir virka fyri, at landskassans áhugamál verða røkt. Gera tey ikki tað, so eiga umboðini at verða skift út, sigur Eyðólv Dimon at enda.

## HOYRT OG SÆÐ

### Útvarps- og sjónvarpsummæli

Bæði Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hava nú lagt fyri veturin við broyttari skrá. Sjónvarpið við longdari senditíð, nú mikukvøldið er komið afturat, og »dagur og vika« nummar fýra er komin. Hetta er eisini útmerkað, og eiga vit at fegnast um, at vit nú økja um tíðindasendingarnar í sjónvarpinum. Vit eiga ikki at bera ótta fyri, at mentanin køvist, tí hvat eru tíðindi annað enn mentan? Haraftur at eru júst tíðindi við til at styrkja fólkaræði - góð fólkaupplýsing er hornasteinurin í demokratisku stýrisskipanini.

Útvarpið longdi senditíðina í fjør leygarkvøld við frálíku sendingini, »Náttarravnum«. Hóast útvarpið er fongt við alt ov nógvum tónleikasendingum, sum ikki eru annað enn tónleikur(!!!), so var henda sending eitt framstig og eiga verturnir báðir, Birgir Kruse og Heðin Arge Jensen rós uppiborið fyri tað.

Hinir, sum eru vertur í »nýtt og gott gamalt« áttu at stungið fingurin í jørðina. Tað er ómetaliga keðiligt *bara* at hoyra tónleik. Og so ikki at tala um, tá Jóhannus á Rógvu Joensen letur plátuspælaran standa frá út í eitt, til kl 13:57, og tá fer at reksa upp løgini, hann hevur spælt. Tað er burturspilt orka at gera slíkar sendingar. Mikið meiri áhugavert hevði tað verið, um verturnir kundu sagt okkurt um tónleikin, tónleikararnar ella okkurt líknandi. Tosað eitt sindur meiri, so sendingarnar vóru meiri fjøltáttaðar. Tá útvarpsmaðurin sigur: *» - Nú spæla vit eitt sindur av tónleiki, til næsta tónleikasending kemur...«*, ivast tú í, nær vit hava pausutónleik og nær vit hava tónleikasendingar. Soleiðis skal tað ikki vera.

Vælvitandi, at børn fylgja væl við tí, ið fyriferst, so tykist løgið, at so fáir av okkara fittu barnasongum eru at hoyra í Barnaútvarpinum. Serliga at »mentaðir menn«, sum Bjørgfinnur Nielsen, Høgni Joensen o. a. spæla so nógvan harðan rokk fyri børnunum. Hans Andreas man framvegis hava tokka barnanna millum.

Sendingin »Magnussen & Magnussen«, hjá Jákupi og Rasmusi, varð fyrstu ferð at hoyra fríggjakvøldið. Um enn sendingin varð merkt av, at hetta var fyrsta sending, so hóskar hon væl til »tómrúmið«, sum verið hevur fríggjakvøld, hvat útvarpssenditíð viðvíkur. Tað er ógvuliga skilagott av útvarpsleiðsluni at taka kappingina upp við sjónvarpið. Tað skal jú vera kapping um lurtararnar/hyggjararnar - tað skal vera eitt reelt

*Tá tú tørt »gamlar vittigheðir«, ivast tú í, um tað ikki er hyggjarin, ið verður hildin fyri gjøldur.*

væl, um tú vilt hyggja í sjónvarp, ella lurta eftur útvarpi. Hatta er gott, eitt satt framstig, ið vit fegnast um. Hatta við at fáa lurtararnar at luttaka er gott - náttarravnarnir eru jú komnir væl frá tí. Vit kunnu geva Rasmusi og Jákupi eitt heraklapp - og drivið á!

Sjónvarpið vísti leygarkvøldið fyrstu sendingina, »Pipar og salt«, sum bólkurin Skálkabrós hevur skipað fyri. Tann sendingin var »piparslig« - eitt satt vónbrot. Somu fólk hava í summar reikað runt landið við eini kabarett, sum fekk misjavna undirtøku. Tey gjørdu eisini nakrar sendingar í sjónvarpinum í fjør, sum vóru í sama stíli, sum sendingin leygarkvøldið. Og hatta er bara ikki gott. Tú ivaðist fleiri ferðir, nær og um tú skuldi flenna.

Eitt tað fyrsta tú kanst finnast at, er at sama scena verður endurtikin fleiri ferðir. Serliga hasin »belisni« asfaltføroyingurin í bláu regnklæðunum og við sterku brillunum. Hann var eisini brúktur seinast á júst sama hátt!!! Eisini var hann brúktur í einum reklamuinnslagi í Degi og Viku í summar, í samband við kabarettina. Tá kanst tú ivast í, um tað ikki er *hyggjarin*, sum í veruleikanum verður hildin fyri gjøldur.

Astarscenan í sakføraraheiminum í Hoydølum tóktist eisini málplaserað. Hvat var poengið? At provokera onkran erkvisnan missónsmann, ella skuldi hetta tala til girndina, sum í okkum býr?

Hinvegin kunnu vit siga, at føroyingurin ikki er vanur við at síggja slíkar sendingar. Ov lítið verður kanska gjørt av slíkum. Slíkar sendingar eiga jú at siga eitt sindur um samfelagið - á ein øðrvísi hátt. Men her situr tú líkasum við mistankanum um, at hesi fólkini kanska ikki kenna samfelagið nóg væl? Tey eru jú sjálv »asfalt-føroyingar«, í útlegd í lestrarørindum.

Nú velst øll meting, ið gjørd verður, um eygað, ið sær, ella oyrað, ið hoyrir. Men fjøltáttað og nýskapandi var sendingin ikki, og hevði heldur verið væl egnað í einum klassaballi í studentaskúlanum.

*arp.*